# Ársfrágreiðing hjá Føroyska Bíbliufelagnum
# 12. mars 2015
# Keldan, Skálafjørður

Ásbjørn Jacobsen, aðalskrivari
Bergur D. Joensen, formaður

Tað er við gleði og frímóði at vit kunnu kunngera tykkum, at vit hava havt eitt gott og gleðiligt ár síðan seinast, vit vóru saman til aðalfundar í Hoyvíkar kirkju. Hetta er triðja árið vit hava aðalfundi hjá Føroyska Bíbliufelagnum.

**Stýrið**
Vit hava frá fyrsta degi upplivað ein sera góðan samstarvsvilja frá øllum pørtum í stýrinum. Kjakið og málsviðgerðirnar í stýrinum hava verið opnar og konstruktivar. Stýrið hjá Bíbliufelagnum er mær vitandi breiðasta forum í landi okkara tvørkirkjuliga sæð. Fólkakirkjan er væl umboðað við síni leiðslu og rørslum, samkomurnar somuleiðis eins og Katólska kirkjan. Tað hevur verið hugaligt at uppliva, hvussu kristnu virði okkara og felags áhugin fyri Bíbliuni hevur bundið okkum saman. Sama góða samstarv hava vit havt í starvsnevndini. Og ikki minst er tað okkara forseta at takka, Jógvani Fríðrikssyni, at alt hevur gliðið so væl. Biskupur hevur víst Bíbliufelagnum stóran ans og stuðla tí sera væl, síðan hann setti skjøtul á at fáa stovnað sjálvstøðugt bíbliufelag í 2012.

**Nýggj bíbliuapp og nýggj heimasíðan**
Bíbliufelagið hevur latið gera ein nýggja bíbliuapp, sum vit lótu út ókeypis í fjør. Tað er Jógvan Joensen av Skála, sum hevur latið hetta gera. Sami maður gjørdi okkum eisini eina nýggja heimasíðu, sum eisini varð tikin í nýtslu í fjør. Bæði appin og heimasíðan eru framúr amboð at nýta í okkara tíð og eru av hægstu dygd. Vit ynskja at heita á limir okkara at gera ambassadørar fyri appini, so at so mong sum møguligt kunnu fáa hana á sína snildfon. Appin hevur eina framúr leitiskipan, og eri eg ikki einasti, sum eri á henni nærum hvønn dag. So hava vit eisini eina heimasíðu, sum tú eisini kann kunna fólki um. Ásbjørn Jacobsen, okkara aðalskrivari, umsitur heimasíðuna, og heldur hann hana sera væl. Vit bjóða út - frítt sjálvandi! – øllum brúkarum at lurta eftir bíbliutekstunum eins og øllum øðrum tekstum á síðuni. Lurtiskipan okkara er ein av teimum mest framkomnu í heiminum, halda vit. Fólk hava tikið sera væl ímóti.

**Nýggja Testamenti í vanligari týðing**
Týðingin, sum Hans Jacob Joensen við fleiri hevur latið týða, er til rættlesturs hjá málkønum við sambandi til Fróðskaparsetur Føroya: Anfinnur Johannesen, Marius Staksberg og Johan Hendrik Winther Poulsen manna týðingarliðið. Matteus Evangeliið er liðugt rættlisið, og verður tað sent Bíbliufelagnum eftir ætlan í komandi viku. Anfinnur Johannesen, sum leiðir rættlesturin, vónar, at alt Nýggja Testamenti liggur á heimasíðuni hjá Bíbliufelagnum til ummælis í 2016.  Ætlanin er, tá ið tíðin er

búgvin at leggja hesa týðing til Mentamálaráðið til løggilding. Nær arbeiðið er liðugt, er ov tíðliga at siga.

**Nýggja Testamenti fyri ung og bíbliufremmand**
Heri Tóndheim er komin væl áleiðis at týða Den Ny Aftalee, sum er ein lætt skillig týðing, sum Danska Bibliufelagi hevur givið út. Stýrið hevur valt ein fylgibólk at meta um týðingina til tað føroyska jørðildi og at sparra við Hera. Málið er, at ung og bíbliufremmand skulu hava lættari at lesa og skilja Nýggja Testamenti. Hetta er sera avbjóðandi arbeiði, tí vit hava ein grundtekst at halda okkum til, og vit hava ein serligan málbólk at náa. Í fylgibólkinum sita tveir gudfrøðingar, Øssur Kjølbro og Maria Jørðdal Niclasen, har harafturat Eyðgerð Abrahamsen, og fyri fríkirkjurnar: Jóhan Petur Johannesen og Hallgerð Akurstein. Ásbjørn Jacobsen er skrivari í fylgibólkinum. Nær hetta arbeiðið er liðugt, er eisini ov tíðliga at siga.

**Forlag og Sameindu Bíbliufeløgini (UBS)**
Við í endamálunum hjá Bíbliufelagnum er at geva út tilfar á føroyskum. Her er fyrst og fremst talan um Bíbliuna ella partar av henni og annað viðkomandi tilfar, sum gagnar bíbliulestri og bíbliukunnleika. Eisini skulu vit hava forlag, um vit skulu gerast partur av Sameindu Bìbliufeløgunum. 1. februar í ár samtykti stýrið viðtøkur fyri nýggja forlag okkara, sum í øllum førum fyribils eitur Forlagið hjá Bíbliufelagnum. Í nevndini skulu sita 5 limir – umframt formannin í stýrinum og skrivaran, velur stýrið tríggjar aðrar limir. Forlagið, sum verður stóra arbeiðið hjá Bíbliufelagnum, er neyvt tengt at stýrinum hjá felagnum. Tí er nevndin sett av og hoyrir undir stýrið og hevur ábyrgd mótvegis tí. Somuleiðis skal stýrið góðkenna útgávuætlanir og fíggjarætlanir tess. Endamál forlagsins er, sum tað stendur, " at geva út Bíbliur, partar av henni og annað viðkomandi tilfar til allar aldursbólkar, bæði uppruna føroyskt tilfar og týðingar."

**Viðtøkubroytingar**
Stýrið, sum leiðir og myndar arbeiðið hjá Føroyska Bíbliufelagnum, hevur varnast, at neyðugt er at gera nakrar broytingar í viðtøkunum fyri felagið. Hetta, fyri at gera viðtøkurnar greiðari og lættari at umsita, og at fáa tær betri at passa til tann veruleika, Bíbliufelagið arbeiðir í.

Seinasta aðalfund boðaðu vit frá, at stýrið hevði samtykt at geva Kirkjuliga Missiónsfelagnum fastan lim í Stýrið. Til tess má ein viðtøkubroyting.

Í roynd og veru er tað Fólkakirkjan við tess rørslum, sum altíð eigur meirilutan í stýrinum, og tað er fólkakirkjan saman við samkomur og fríkirkjur her á landi, sum eiga Bíbliufelagið. Men vit vildu frá frystu tíð, at aðalfundurin skuldi fáa lim í stýrið eisini. Og so hevur verið. Men nú skjýtur stýrið upp, at vit í staðin fyri heitið aðalfundur nýta limafundur um henda fund, vit eru savnað til í dag, tí heitið aðalfundur boðar frá, at hann er hægsti myndugleikin og kann t.d. taka yvir rættindini til Bíbliuna og koyra stýrið til hús – burtursæð frá biskup og próst, sum er fastir stýrislimir. Vit eru sannførd um, at tað er Fólkakirkjan, rørslur, samkomur og fríkirkjur, sum frítt velja síni umboð, eins og aðalfundurin ella limafundurin síni. Við

nýggja uppskotinum til viðtøkur, sum verða lagdar fyri aðalfundin í dag, verður givið avvarandi kirkju, rørslu, samkomu og fríkirkju at velja og góðkenna síni umboð í samráði við stýrið og somuleiðis at góðkenna roknskapin. Men nýggja viðtøkuuppskotið geva limafundinum roknskapin til kunningar og gevur limafundinum rættindi at velja tvey heldur ein eitt umboð í stýrið. Og at hesir stýrislimirnir sita í trý ár heldur enn.

Limafundurin hevur ikki bara ávirkan við sínum stýrisumboðum, men limirnir fáa har eisini kunning um arbeiðið og kunnu gera viðmerkingar til ársfrágreiðingina eins og roknskapin og geva íblástur til arbeiðið.

Stýrið skal lurta. Lurta eftir sínum avvarandi andaliga samanhangi eins og lurta eftir sínum limum!

**Bíbliulestur**
Umframt at geva út Bíbliur og annað til Bíbliuna viðkomandi tilfar, er eitt av aðalmálunum hjá Bíbliufelagnum at fáa fólk at lesa Halgubók. Okkara framtíð sum kristin er neyvt tengt at teirri bók, sum hevur givið felagi okkara sítt navn.

Vit eru Gudi og aðalskrivara okkara ósigiliga glað fyri, at tað hevur eydnast honum hetta seinasta árið at fingið eggjað fólki í stórum tali at lisið regluliga í Bíbliuni og at givið teimum viðkomandi upplýsingar. Og til hetta endamál hevur Facebook verið tann reini fongur.

Fyrsta verkætlanin seinna hálvár í fjør æt "NT-100": Tað merkir, at lesa Nýggja Testamenti í 100 dagar. 360 vóru í hesum bólki á Facebook.

Onnur verkætlanin, sum byrjaði við ársbyrjan eitur "GT-2015": Tað merkir, at lesa Gamla Testamenti hetta árið. 468 eru við í hesum bólki.

Triðja verkætlanin, sum byrjaði í februar í ár, eitur "30 dagar saman við Jesusi." Tað merkir at lesa tekstir, sum beinleiðis umtala Jesus. 1.410 – serliga ungfólk – tóku lut í hesum.

Fjórða verkætlanin, sum er byrja nú fyrst í mars, eitur "40 dagar saman við Jesusi." Hvønn dag hetta tíðarskeiðið leggur Ásbjørn út eitt stutt video-klipp við enskari talu um Jesu lív og virki, og hvussu Jesus ynskir at vit skulu liva sum kristin. Eisini er ein bíbliutekstur tengdur til hesa verkætlan hesar dagar. Far inn á heimasíðuna og tekna teg. ☺

**Danska Bíbliufelagið og samstarv**
1. mars fór aðalskrivarin í Danska Bíbliufelagið, Morten Thomsen Højsgard, frá. Hann hevur tikið við sum leiðari á kendu donsku útvarpsrásini P1, har hann skal leiða eina deild, sum viðgerð søgu og átrúna. Morten hevur ph.d innan samskifti. Vit hava takkað Mortani fyri tann stóra stuðul hann hevur veitt okkum, so vit fingu rættindini til Dahl/Viderø-Bíbliuna heim og at byggja upp sjálvstøðugt føroysk bíbliufelag. Vit

takka fyri samstarvið og ynskja honum blíðan byr, og vit vóna at varðveita góða samstarvið við Danska Bíbliufelagið framyvir.

**Bøn**

Til seinast vilja vit heita á limir okkara og stuðlar at biðja fyri stýrinum og teimum, sum arbeiða við rættlestri, týðing og sparring, so at bíbliuarbeiðið má ganga væl og at týðingarnar báðar koma at gagna fólki okkara væl. Biðið eisini fyri nýggja forlagnum, sum er ávegis. Og biðið fyri Sameindu Bíbliufeløgunum, og teirra strevi at geva heimsins íbúgvum Bíbliuna á sínum máli. Bíbliufelagsarbeiði er andaligt arbeiði, tí biðja vit!.

Takk til kirkjur og samkomur, felagsskapir og einstaklingar fyri samstarv, fígging, góð hugskot og forbøn.

Takk til allar limir okkara fyri stuðul.

Hjartans takk!

Gud signi bíbliusøkina!